# Tiltøk

**Christianskirkjan**
Fríggjadagin 3. des. kl. 15 Jólahugni fyri eldri. Øll eru vælkomin.

**Aftankvirra í Havnar kirkja**
verður fríggjakvøldið 3. des. kl. 21-23. Kl. 22 syngur Berghild Poulsen advents- og kvøldsálmar. Kl. 22.30 verður andakt.

**Havnar kirkja**
Leygardagin 4. des. kl. 14 Jónsvein Bech, deyvagudst.

**Jólakonsert í Vesturkirkjuni**
Sunnukvøldið 5. des. kl. 19.30 er jólakonsert við Tórshavnar Manskóri. Solistar: Ernst Sondum Dalsgarð, tenor, og Andrias Reinert, bass.

**Sunnudag 5. desember**
**Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna*
**Havnar kirkja:** kl. 11 Sverri Steinhólm, altarg., skriftamál kl. 10.40. Tónleikararnir Súsanna Joensen á floytu og Bjarni Berg á klarinett framføra og spæla undir
**Hoyvíkar kirkja:** kl. 11 Ann D. Hansen Sunnudagsskúli er undir gudst.
**Vesturkirkjan:** kl. 11 Bergur Debes Joensen. Sunnudagsskúli er undir gudst. Talvan gongur
**Kirkjubøar kirkja:** kl. 11 Derhard Jógvansson, altarg.
**Sumba:** kl. 11 Patrick de Neergaard, altarg.
**Hósvíkar kirkja:** kl. 11 familjugudst. Børnini syngja. Ólavur spælir. Barnadópur v/Henning Bøgesvang
**Sjóvarkirkja:** kl. 12 Símun P Jacobsen. Kórið hjá Jóhan luttekur
**Kunoy:** kl. 12 Hanus á Gørðum. Streingjakórið í KFUM og K luttekur. Sjónvarpað
**Fríðrikskirkjan:** kl. 11 Lestur. Talvan gongur
**Gøta:** kl. 12 Lestur. Talvan gongur
**Norðskála:** kl. 12 Emil Olsen, messa
**Eiði:** kl. 17 Emil Olsen, ljósgudst. Samvera verður í Karmel aftaná
**Sørvágur:** kl. 11 David Johannesen
**Oyndafjarðar kirkja:** kl. 16 Jólakonsert v/ luttøku av Fuglafjarðar manskórið, Lív Næs og Trónda Enni. Eftir konsertina er kaffi
**Tvøroyri:** kl. 11 Jónsvein Bech, altarg.
**Christianskirkjan:** kl. 11 Magnus Brahé Jørgensen
**Bøur:** kl. 11 Inga Poulsen Dam
**Hvalba:** kl. 12.30 Bjarni Bæk
**Sandvík:** kl. 18 Bjarni Bæk
**Kvívík:** kl. 12 Barnaguðstænasta. Barnakór luttekur. Theodor E. D. Olsen
**Føroysk jólagudst. í London:** kl. 14.30 í donsku kirkjuni í London. 4 St Katherine´s Precint, London NW1 4HH. Uni Næs, dómpróstur, prædikar

**Katólska kirkjan**
Fríggjadag kl. 17.30 messa í Kerit. Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit. Sunnudag kl. 11 hámessa v/ Czelaw Kozon, Biskop í Mariukirkjuni. Aftaná messuna verður ein drekkamunn. Sunnudagsskúli verður kl. 14. www.katolsk.fo

**Adventistakirkjan**
Leygardagin kl. 10 Bíbliugrannsking við Birgir Johannesen. Kl. 11 Gudstænasta við Thorbjørn Brochs

**Lívdin í Skúlanum við Løgmannabreyt**
Sunnudagur Familju- og tilbiðjanarmøtið byrjar kl. 10.30 og lovsongur og tala kl. 12. Á familjumøtinum verður tilbiðjan. Tey ungu skipa fyri saman við UngLív. Seinna møtið kl. 12, verður sum eitt leygarkvølds Alive ungdómsmøti. Drama, sangur og vitnisburðir verða. Jógvan Zachariassen hevur eitt stutt orð. Sunnudagsskúli og barnaansing er kl. 12 Hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Marknagil Fjalsg. 2, Tórshavn**
Sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangeliskt møti Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti Verið hjartaliga vælkomin.

**Sjómanskvinnuringurin í Havn**
Vit koma saman í meinigheitshúsinum mánadagin 6. des. kl. 19.30.

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Sunnukvøldið møti kl. 18 v/Silas Olufsson

**Hebron á Argjum**
Sunnudagur kl. 10.30 Morgunmøti. Kl. 12 Annika Rajani greiðir frá um barnaheimið Shanti og vísir myndir, eisini syngur barnakórið.

**Frelsunarherurin**
Sunnudagin Kl. 11 Halgunarmøti v/ Jacobinu Heinesen og Jens Eli Albinus. Kl. 11 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bøn. Kl. 18 Møti v/ Victor og Mirijam Carlsen og Sofus Hansen. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Jan Johannesen, Miðvági

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Sunnudagin kl. 15 Jólaveitsla fyri tey yngru. Kl. 18 Jólaveitsla fyri tey eldru Øll eru hjartaliga vælkomin

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl 15 Jólaveitsla hjá sunnudagsskúlanum.

**Filadelfia Tórshavn**
Fríggjadagin kl. 07.15 Morgunbøn. Kl. 20 Mammur hittast til bøn Leygarkvøldið kl. 21 Flare Sunnudagin kl. 15 Jólaveitsla – øll eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagur 6. des. kl. 15 í KFUK: Seinnapartssamkoman við Derhard Jógvansson.

**Fríkirkjan Oasan**
Fríggjakvøldið kl. 20 hevur After8 Jólaveitslu. Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Jóna Johannesen. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti Verið hjartaliga vælkomin.

**Ebenezer**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Rólant í Skorini talar um evnið ‘Gud Sonurin – Lív Jesusar’. Barnaansing er í Lítla Sali. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangeliskt møti. Barnaansing er í Stóra Sali

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman**
Møti verður sunnukvøld kl. 18. Øll eru vælkomin

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/Sigmund Andreasen sum talar og syngur. Hjartaliga vælkomin.

**Aglow Sandoy**
Jólahugni fyri kvinnur og menn verður leygarkvøldið kl. 19 í Samljóð Skopun. Vitjan av Majken og Ragnar Ludvig. Sangur við Betaniakórinum og øðrum. Smurt breyð, mandluris og annað gott er at fáa. Hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia Vágar**
Sunnudagin kl. 16 Temadagur við Jens Olsen. Nátturði verður aftaná. Sunnudagsskúlin er samstundis. Øll eru vælkomin.

**Sandavágs kirkja**
Sunnudagin kl. 16 verður felagssangur í kirkjuni. Sungnir vera jólasálmar og sangir. Hugleiðingar um jólini vera inn ímillum. Eftir sangløtuna í kirkjuni, verður jólatræið hjá kommununi tendrað kl. 17.

**Meinigheitshúsið í Sandavági**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman týskvøldið kl. 20 til jólahugna. Allar kvinnur eru vælkomnar. Minnist til pakkarnar.

**Saron Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/breyðbróting

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti í missiónshúsinum við Thomas Juul Askham úr Hósvík. Hallmar Winther úr Skopun syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin. Nýggja missiónshúsið verður vígt sunnudagin 12. des., kl. 16.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Adventshugni verður í Ítróttarhøllini sunnudagin kl. 16. Jólatræið verður tendra samstundis. Týskvøldið verður bønarløta kl. 19.30 og bíbiltími “ Diakon í triðja heiminum “ V/ Hildu Viderø kl. 20. Mikukvøldið verður juniorhugni kl. 19-20.30.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Fríggjakvøldið kl. 19 juniormøti Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/ Pól Johannesen, innsavnan og drekka. Barnaansing. Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj og Malmberg Olsen. Sangluttøka við Odu á Fríðufløtum.

**Missiónshúsið Tabor, Toftir**
Fríggjadagin kl. 16. verður seinnapartssamkoma. Øll eru vælkomin. Kl.18. verður dekratiónskvøld. Tá vera dekratiónirnar gjørdar og bornar út til tey eldru. Øll eru vælkomin at vera við

**Hvalvíkar missiónshúsið**
Adventshugni verður sunnudagin. Byrjað verður við kirkjugongd kl. 16. Aftan á verður fari í missiónshúsið til ein drekkamunn, dansa verður um jólatræið og jólamaðurin kemur. Øll eru vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 17 Møti Øll hjartaliga vælkomin

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjakvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 17 Filmur frá GLS verur sýndur. Streingjakór luttekur, innsavning til húsi. Eftir møti verður kaffi. Manglar fart, so ring á tlf. 447090 ella 775091

**Stranda Missiónshús**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Heðin Djurhuus

**Eysturoyar Gongufelag**
Sunnudagin kl. 16 møtast vit í ljósskrýddu bygdini Æðuvík. Hettar verður seinasta tiltak í ár.

**Thabor í Fuglafirði**
Adventshugni verður mánakvøldið 6. des. kl. 19.30. Jofridt Jensen talar og Óli Jacobsen hugleiðir um Lagnusøgur á sjónum. Manskórið í THABOR syngur. Borðhald og innsavnan til Sjómansmissiónina. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14.30 og kl. 18 verður møti har ung skipa fyri. Meiri kunning leirvikar.fo. Øll eru vælkomin.

**Aglow Klaksvík**
Týskvøldið 7. des kl. 20 verður møti á Soli Deo Gloria, við Ernu Háberg og Preben Hansen. Øll eru vælkomin.

**KFUM & K í Klaksvík**
Leygardagin kl. 10 Livandi ljós - jólasøla. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 17.30 bønarløta. Kl. 18 møti. Innsavnan til húsið. Kl. 21 ungdómsmøti.

**Avhaldshúsið í Mikladali**
Møti verður í avhaldshúsinum í Mikladali leygarkvøldið kl. 19.30. Gulak og Jónhildu Hansen úr Tjørnuvík og Hanus Lassen úr Klaksvík koma at luttaka við sangi og vitisburði. Øll hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Hvørt týskvøld kl. 20 er bønarmøti

**Meinigheitshúsið, Vágur**
Sunnukvøldið kl. 18 evangeliskt møti við Hilmar Bech.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 við Ebbu Vágsheim.

**Aglow Suðuroy**
Jólahugni fyri kvinnur og menn verður leygardagin kl. 19 í Missiónshúsinum í Vági. Luttøka av toymi úr einum YWAM-skúla í Finlandi. Hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf. 316491/286491*
*Opið er mánadag-hósdag kl. 9-17 og fríggjadag 9-16*
*tilhald@torshavn.fo*
Fríggjadag
Kl. 9-16 Motiónarúmið opið
Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn hjartaliga vælkomnir.
Kl. 10-13 Matklubbur. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 13-16 Jólasøla á vegghæddini.
Kl. 13-16 Livandi verkstaður av horn- og beinarbeiði verður í kjallaranum.Til ber at keypa sær eitthvørt, ið húsfólkini hava gjørt á verkstaðnum.
Leygardagur
Kl. 10-14 Jólasøla á vegghæddini
Mánadagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið. Í motiónsrúminum er rógvimaskina, motiónsúkkla, renniband og krossari.
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Kl. 11 Enskt talumál í køkinum á 1. hædd.
Kl. 14-16 Telduskeið: Grundskeið (óroynd) Páll Poulsen.
Kl. 13-16 Jólasøla á veghæddini
**Jólatúrur:** Mikudagin 8. des. busstúrur til Æðuvíkar kl. 15 úr Steinatúni og í Havnini aftur um 18 tíðina. Kostnaður 100,- Gjaldast mánadagin 6. des.

**Pensionistafelagið í Havn**
*Tlf. 222733*
*finnurj@post.olivant.fo*
Jólahugni við nátturða og rís´alamande v.m. verður í Losjuni mikukvøldið 8. des. kl. 19. Eisini verður burturluting, Limirnir hava pakkar við. Limir kunnu, á fundinum ella hjá felagnum, teknað seg til jólaborðhaldið á Hafnia 15. des. og sum kostar 225 kr. fyri hvønn.

**Eldrafelagið Kumlá á Skála**
hevur jólahugna við burturluting týskvøldið 7. des., kl. 19. Mint verður á at hava pakka við.

**Sunda pensionistafelag**
Jólaveitslan verður í Bygdahúsinum í Hósvík 11. des. kl. 17.30. Kostnaður 130 kr. Seinasta freist at tekna seg er mikudagin 8. des. hjá einum av nevndarlimunum. Minnist til at hava jólapakka við. Bussur koyrir frá streyminum

# Merkisdagar

## Gullbrúdleyp
Leygardagin 4. des. hava Kristianna og Ove Magnussen Toftir, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í kjallaranum í Fríðrikskirkjuni kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Silvurbrúdleyp
Týsdagin 7. des. hava Joanita og Jan Jacobsen, Saltangará, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Kelduni í Skálafirði týsdagin 7. des. kl. 18. Tey ið ynskja at halda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 747547 áðrenn 3. des.

Týsdagin 7. des. hava Alith og Heðin í Frammistovu, Hvannasund, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin 4 des. kl. 18. fyri innbodnum bygdarhúsinum í Leirvík.

Týsdagin 7. des. hava Frida Vitalis og Kristoffur Joensen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Opið hús verður heima Undir Hálsi 57 frá kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 100 ára føðingardagur
Hilmar Heinesen, Lágargarður, Tórshavn, fyllur 100 ár, týsdagin tann 7. des. Dagurin verður hildin á Lágargarði frá kl. 15-17.

## 80 ára føðingardagur
Fríggjadagin 3. des. fyllir Mads W. Hentze, Skopun, 80 ár. Dagurin verður hildin í Samljóð í Skopun sama dag frá kl. 14-19. Øll er vælkomin.

## 65 ára føðingardagur
Fríggjadagin 17. des. fyllir Kamma Johannesen, Trongisvágur, 65 ár. Dagurin verður hildin í Missiónshúsinum frá kl. 18. Tey ið ynskja at halda dagin saman við mær verða biðin um at siga frá á tel. 372872 innan 5. des.

## Brúdleyp
Leygardagin 4. des. giftast Jónva E Royðutoft, Strendur og Jónleif Eliasen, Tórshavn. Vígslan verður í Kelduni í Skálafirði kl. 13 og veistlan byrjar kl. 18 í Bygdarhúsinum á Strondum fyri tey sum hava tilmelda seg.